# Og so spentu tey avstað



**Klokkan var 15 leygardagin, ella nakrar minuttir yvir, tá fleiri enn 1000 fólk fóru frá Badmintonhøllini. Fleiri enn túsund fólk tóku lut í Fólkaheilsurenningini í Havnargøtum**

FÓLKAHEILSURENNING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fyrst var upphiting og síðani nøkur vegleiðandi orð, innan Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður fekk orðið. Hann fegnaðist um stóru luttøkuna. 1025 høvdu teknað seg at renna, men nøkur løgdust afturat í síðstu løtu.

Síðani varð talt niður frá 10 og stóri hópurin av børnum, monnum og kvinnum, yngri og eldri, helt avstað. Summi við fullari ferð, onnur smárennandi og uppaftur onnur spákandi. Og so eru tað eisini tey minstu, ið verða trillaði í vogni, men eisini tey fáa túrin burturúr.

# Gluggaglæma er sett

**Klokkan 14:30 leygardagin setti Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, søluframsýningina Gluggaglæma í Müllers pakkhúsi**

FRAMSÝNING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Talan er um føroyskt snið og handverk og eisini eru arbeiðandi verkstaðir at síggja.

Heðin Mortensen fegnaðist um alt, ið er at síggja á sýningini og minti m. a. á, at tá kongalig vitjan var herfyri, so hevði Tórshavnar Býráð samkomu júst í sama húsinum og ongin ivi var um, hvør gávan til royalu gestirnar skuldi vera, nevniliga eitthvørt tilevnað av føroyskum sniðgevum.

Hann nevndi William Heinesen, og umskrivaði orð hansara eitt sindur og segði, at tað er umráðandi at skapað verður, men eisini sera umráðandi er tað, at tað eru eygu, ið síggja.

Sunnudagin klokkan 15 hevði Gluggaglæma tiltak í Norðurlandahúsinum, nevnt Upprák, har útvald verk eru við til snið og handverkskapping 2005. Eisini bar til at síggja Unika borð og stólar hjá Rógva í Bø og Jógvan A. Absalonsen.

Gluggaglæma í Mullers pakkhúsi er opin gerandisdagar frá klokkan 10 til 20 og sunnudagar frá 14 til 20.

# Danir vunnu og føroyingar stóðu seg væl

**Norðurlendska kappingin í jazzi í Norðurlandahúsinum er av. Danir vunnu, men føroyingar stóðu seg væl**

JAZZKAPPING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Norðurlendsk jazzkapping hevur verið í Norðurlandahúsinum í dag. Talan er um kappingina Young Nordic Jazz Comets.

Kappingin ferðast millum Norðurlond og er í teimum ymsu høvuðsstøðunum. Í dag hevur kappingin verið í Havn.

Føroyska umboðið í kappingini var bólkurin Ben-Jammin, har Tróndur Olsen, Dávur J. Magnussen, Benjamin Petersen og Jan Rúni Poulsen leika við.

Tað vóru danir, ið struku avstað við fyrstaplássinum. Bólkurin JazzKamikaze vann í stórum stíli, men føroyingar stóðu seg væl í kappingini, frættist.

Vinnandi bólkurin vinnur eina tónleikaferð kring í Norðurlondum.

Eisini var virðisløn latin til besta bassleikara og tað var bassleikarin í svenska bólkinum Millenium, ið vann tær 5000 krónurnar.



Hi-Fi
damor

Thomson 20" sjónvarp


Kompakt 20" sjónvarp við scart stikk, Avinngangi framman og fjarstýring

Thomson 28" sjónvarp


28" sjónvarp við scart stikk, AV-inngangi framman og fjarstýring

Thomson DVD spælari


Snøggur dvd avspælari ið umframt DVD spælir mp3, WMA, jpeg og DivX

Thomson ghettoblaster


Ghettoblaster við Útvarpi, kassettuspælara og fløguspælara.

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor